## Fróði aftur í B36

Á heimasíðuni hjá EB/Streymi verður sagt, at 30 ára gamli Fróði Clementsen hevur boðað frá, at hann ikki leingir sáttmálan við felagið. Enn vil spælarin sjálvur ikki gera nakrar viðmerkingar, men tað verður roknað sum sannlíkt, at hann í 2009 fer at spæla við barndómsfelagnum, B36. Umframt B36 og EB/Streym hevur Fróði áður spælt við B68 og AB.



## Arkitektar skráseta ítrótt

Tórshavnar kommuna hevur sett ein arbeiðsbólk at gera nýggja "Heildarætlan fyri ítróttin í Tórshavnar kommunu". - Fyri henda arbeiðsbólkin eru vit farin at savna upplýsingar frá øllum ítróttarfeløgunum í kommununi, so eitt greitt yvirlit fæst viðvíkjandi hallar- og vallarumstøðum hjá øllum teim ymisku ítróttargreinum, sum eru í kommununi, sigur arkitekturin Nina A. Arge, sum saman við Biritu Wardum savnar inn upplýsingarnar. Báðar eru tær útbúnir arkitektar. Frestin at svara er góðar tvær vikur. Spurnarblaðið, ið fevnir um 10 spurningar, skal verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 20. november 2008

# Sendir føroyingar til Argentina

**Vanliga gongur streymurin av fótbóltsspælarum úr Suðuramerika til Europa. Nú gevur Ólavur Waag Høgnesen føroyskum spælarum møguleika at venda streyminum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ólavur Waag Høgnesen hevur áður fingið spælarar úr Suðuramerika hendavegin. Nú letur hann upp fyri møguleikanum at senda føroyskar spælarar til Argentina*

Ólavur Waag Høgnesen hevur seinasta góða árið virkað sum spælaraumboðsmaður, og hevur hann sett á stovn Trans-Atlantic Talent Agency. Saman við argentinska ABC Sport Agency er hann nú gingin í samstarv, har føroyskir spælarar fáa møguleika at royna seg í argentinskum fótbólti.

Endamálið við hesum er fyrst og fremst at geva ungum føroyskum spælara møguleika at menna seg sum spælarar. Pengar eru ikki tað, sum tað er mest av í suðuramerikonskum fótbólti, men hinvegin er hetta ein møguleiki at spæla á høgum støði, har europisk eygu eisini eru vend móti avrikunum.

- Føroyskir ungdómar – sama um teir eru fótbóltsspælarar ella ikki – liva í einum smørleypi, so tað er stórt stig fyri føroyskan spælara at fara út um Europa at spæla. Hinvegin halda vit, at hetta er ein góður møguleiki hjá teimum, sum taka, og eg ivist ikki í, at tað eru spælarar, sum hava tað, sum krevst, fyri at standa hesa royndina, sigur Ólavur Waag Høgnesen, sum tó ikki roknar við tí heilt stóra gravganginum frá føroyskum spælarum. Men hann vónar tó, at tað ber til at senda einar tveir spælarar avstað eftir ársskiftið.

Fyri føroysku spælararnir verður talan ætlandi um tvey ára sáttmálar, harav fyrstu fimm mánaðirnir eru royndartíð.

**Støðan í bólkaspælinum**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Chelsea | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 3 | 3 | 7 |
| 2 | Roma | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 6 |
| 3 | Bordeaux | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 6 |
| 4 | CFR Cluj | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| **Bólkur B** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Inter | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 2 | Anorthosis F | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 3 | Panathinaikos | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 4 | Werder Bremen | 4 | 0 | - | 3 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| **Bólkur C** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Barcelona | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 3 | 8 | 10 |
| 2 | Sporting L. | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 3 | Shakhtar D. | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 4 | Basel | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 10 | -8 | 1 |
| **Bólkur D** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Atletico M. | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 2 | Liverpool | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 3 | Marseille | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 4 | PSV Eindhoven | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| **Bólkur E** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Manchester Utd | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 8 |
| 2 | Villarreal | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 9 | 5 | 4 | 8 |
| 3 | Celtic | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 1 | 5 | -4 | 2 |
| 4 | AaB | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 5 | 11 | -6 | 2 |
| **Bólkur F** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Lyon | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 10 | 6 | 4 | 8 |
| 2 | Bayern München | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 8 |
| 3 | Fiorentina | 4 | 0 | - | 3 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| 4 | Steaua B. | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| **Bólkur G** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Arsenal | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 10 | 3 | 7 | 8 |
| 2 | FC Porto | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 5 | 7 | -2 | 8 |
| 3 | Dynamo Kiev | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 5 |
| 4 | Fenerbache | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 8 | -5 | 2 |
| **Bólkur H** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Juventus | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 10 |
| 2 | Real Madrid | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 5 | 5 | 0 | 6 |
| 3 | Zenit Petersborg | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 4 | BATE Borisov | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |

## Úrslitini mikukvøldið

**Bólkur E**
**AaB-Villarreal 2-2 (0-1)**
0-1: G. Rossi, 41.
1-1: J. Curth, 54.
1-2: G. Franco, 75.
2-2: A. Due, 81.

**Celtic-Manchester United 1-1 (1-0)**
1-0: S. McDonald, 13.
1-1: R. Giggs, 84.

**Bólkur F**
**Fiorentina-Bayern München 1-1 (1-0)**
1-0: A. Mutu, 11.
1-1: T. Borowski, 78.

**Lyon-Steaua Bukarest 2-0 (1-0)**
1-0: Juninho, 44.
2-0: A. Reveillere, 89.

**Bólkur G**
**Arsenal-Fenerbache 0-0**

**Dynamo Kiev-FC Porto 1-2 (1-0)**
1-0: A. Milevsky, 21.
1-1: Rolando, 69.
1-2: L. Gonzáles, 90.

**Bólkur H**
**BATE Borisoc-Zenit Petersborg 0-2 (0-1)**
0-1: P. Progrebnyak, 34.
0-2: Danny, 90.

**Real Madrid-Juventus 0-2 (0-1)**
0-1: A. Del Piero, 17.
0-2: A. Del Piero, 67.

# Enska brakið í Havnar Bio

**Leygardagin verður stórdystur í Premier League, tá Arsenal á Emirates Stadion tekur ímóti Manchester United. Arsenal Føroyar bjóðar øllum sínum fjepparum í Havnar Bio at síggja dystin á stóra løriftinum**

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Nú heystið og enski fótbólturin eru komin væl í gongd, ger eisini fjepparafelagið Arsenal Føroyar ein vørr, nú stórdystur verður millum tvey av fremstu liðunum í Premier League.

Á heimavøllinum Emirates Stadion tekur Arsenal ímóti Manchester United, og væntast kann tað brakið av einum fótbóltsdysti, sum so ofta hevur verið at sæð millum hesi bæði liðini.

Sjálvur dysturin byrjar leygardagin klokkan 12.45, men dyrnar í Havnar Bio lata upp hálvan tíma áðrenn, so fjepparanir kunnu fáa eitt hugnaligt prát saman áðrenn »kick-off«.



*Arsenal fjepparafelagið hevur avtalu við Havnar Bio, har dystir kunnu síggjast á hvíta løriftinum*

Sum vanligt, ber til at vedda um úrslitið undan dystinum fyri 20 krónur, og eftir dystin verður so lutakast um samlaðu puljuna. Hevur eingin gitt rætta úrslitið, verður puljan standandi til næsta dystartiltak.

Tiltakið í Havnar Bio er fyri allar Arsenal-fjepparar og er ókeypis. Bæði verandi og komandi limir eru vælkomnir, og tað ber sjálvandi eisini til at tekna seg sum lim á staðnum.